# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Fótbóltur sum branding

Fremsta føroyska fótbóltsdeildin skifti í gjár navn til Vodafone-deildin.

Í sjálvum sær er tað einvíst positivt fyri føroyskan fótbólt, at tað á henda hátt ber til at selja sítt egna brand, og ongan tíð betri, enn tá peningurin fyri avtaluna fer beinleiðis til arbeiðið í feløgunum, sum jú eru sjálvt grundarlagið undir FSF og harvið eisini fótbóltslandsliðum okkara.

Seinastu fýra árini hava prógvað, at tað eisini her heima væl og virðiliga ber til at navngeva eina deild eftir ávísum høvuðsstuðli.
Meiningarnar um hetta vóru annars sera ymiskar, tá samstarvið millum Formula.fo og FSF byrjaði fyri fýra árum síðani. Og eitt nú fekk hetta somikið ilt í part av kringvarpsmanningini, at fótbóltsføroyar í nakrar vikur máttu halda ondini, tí vandi var fyri, at fótbólturin – og kanska ítróttur sum heild – máttu av sendiflatuni.

Nú fýra ár seinni er eingin ivi um, at Formula-heitið hevur bitið seg fast millum manna. Tosað og skrivað verður um Formula-deild, Formula-bólt og Formula-feløg, uttan at hetta á nakran hátt kennist ónáttúrligt.

Talan er um branding, sum hevur riggað framúr væl. Ja, somikið væl, at hetta í sjálvum sær kann gerast ein tann størsta avbjóðingin í nýggja samstarvinum. Formula-heitið er í dag somikið inngrógvið í føroyska fótbóltsheiminum, at tað fer at krevja eina sera miðvísa marknaðarføring, um Vodafone-heitið skal vinna seg líka fast. Og tað er at vóna, at marknaðarføringin av hesum fer at eydnast eins væl. Tí hetta er í sjálvum sær fortreytin fyri, at talan eisini í framtíðini kann verða um felags branding av bestu fótbóltsdeildini og føroyskum vinnufyritøkum.

**Sosialurin**

## Bókaummæli: »Ódoyggiligar bókmentir«

**HERI MOHR**



Fyri stuttari tíð síðani, beint undan jólum, kom bókin *Memoirer og autobiografi* í bókhandlarnar.

Tað er Heri Kragesteen, sum hevur givið út dagbókurnar hjá langabba sínum, Samuel Frederik Samuelsen, Kvartermester. sum livdi alt sítt lív í Tórshavn frá 1852 til 1932.

Nýkonfirmeraður á vári 1867 fór hann til Danmarkar at arbeiða sum snikkari, men av heilsuorsøkum noyddist hann heim aftur heystið 1868: ”Jeg måtte da med tungt Hjerte rejse derfra, thi jeg havde faaet Landet og Folket meget kært…”

Samuel Frederik Samuelsen hevur óivað verið ein sera uppvaktur og vælbegávaður smádrongur.

Hann var einabarn. ”I min tidligste Barndom voxede jeg op uden Legekammerater, da vort Hus laa enligt ved Skansevejen uden nogen Naboer ... Allerede i 6 Aars Alderen kunde jeg læse…”

Hann varð heimaundirvístur, til hann ”i Otteaars Alderen kom i Thorshavns Realskole, som netop da blev oprettet og begyndte sin Virksomhed under Overlærer E. Bojsen, som var Enelærer de første 3 Aar…Vi var 18 Drenge at begynde med. Pigebørn blev ikke optagne i Realskolen førend flere Aar senere.” ”Egentlig havde jeg ikki lyst til noget undtagen Læsning, som det ogsa gik mig godt med – saa godt at jeg ….” Umleið 19 ára gamal mælti Finsen, amtmaður, SFS at fara á læraraskúla. Hann mintist hvussu væl SFS royndist í realskúlanum, men tá ið amtmaðurin fekk at vita, hvat SFS hevði lovað pápanum, áðrenn hann doyði, og at hetta var orsøkin til, at hann ikki fór í skúla aftur, útvegaði amtmaðurin honum so í staðin fyri starv í ”Politikorpset,” har hann kom at starvast, til hann varð pensioneraður í 1922.

Hesin amtmaðurin Finsen var pápi Niels R. Finsen. Sum kunnugt var NRF føddur og uppvaksin í Havn, og sum lækni og professari var hann heimskendur fyri gransking av og viðgerð við ultraviolettum ljósi. Hann var tann fyrsti læknin í tí danska kongaríkinum, sum fekk nobelprísin (í 1904).

Í bókini *Politi í Føroyum fyrr og nú* frá 1999 er politiarbeiðið síðst í 19. øld og í 20. øld væl lýst við brotum úr endurminningunum hjá SFS, men tað ger ikki bókina *Memoirer og Autobiografi* minni áhugaverda og í støðum eisini spennandi: Einaferð fór vaktarskipið ”Guldborgsund” inn á Vestmanna við fýra skotskum trolarum, sum høvdu trolað innan fyri 3 míla markið. Sjálvur sætti fór SFS við skjútsbáti til Hvalvíkar, haðani teir gingu til Vestmanna. SFS fór fyrst umborð á ”Guldborgsund” og bað um vápn, áðrenn teir skuldu



*Heri Mohr ummælir endurminningarnar hjá Sámali á Krákusteini*

umborð á trolararnar fyri at sigla teir til Havnar. Hetta gjørdist ein sera dramatisk ferð. Við revolvara í hondini gav SFS trolaraskiparanum á brúnni greið boð: ”Well, I am obliged to do my duty, you are a dead man, if you disobey me, you are mistaken, you are not the master here, we are bound for Thorshavn, and there we shall be this evening……”

”I Aaret 1899 havde en Pige fra Midvaag beskyldt den derværende Præst for Voldtægtsforsøg, og efter en tids Arrestation – hun blev arresteret kort efter Nytaar 1900 – og senere nogle Ugers Observation paa Hospitalet, blev det bestemt at sende hende ned til Danmark for at undersøge hendes mentale tilstand …… endskønt hun viste sig normalt opvakt og tækkelig….”

Amtmaðurin gjørdi av, at ”sende mig afsted med hende for at have hende under Opsyn, da hun stedse var arrestant….. ”

Dostojevskij skrivaði ódoyggiligar bókmentir; eisini stuttsøgur við støði í tilvildarligum hendingum ella onkrum í einum tíðindastubba, í einari kunngerð ella í slatri, sum kom honum fyri oyra. Hvat drama hevði ikki ein Dostojevskij ella ein Ibsen kunnað skrivað um ”gentuna og prestin í Jansagerði anno 1899?”

Bókin við 225 síðum er sera áhugaverdur lesnaður. Hon gevur livandi innlit í tíðina, sum so líðandi gjørdi vart við seg, tá einahandilin í Føroyum fór í søguna, og ein nýggj tíð tók seg upp.

Tá ið William Heinesen í 1958 gav út bókina *Det dyrebare Liv* (brøv frá Jørgen-Frantz Jacobsen) vildu donsk bløð vera við, at hetta var ”årets betydeligste bog,” - so lítil hon annars var.

Hetta rann mær í hug, tá ið eg væl nøgdur legði *Memoirer og Autobiografi* frá mær.

Havnarfólk – og nógv onnur – takka langabbasoninum, Hera Kragesteen, fyri bókaútgávuna.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.